## Hávasummar í Meksiko

Trý fólk eru álopin, og tvey eru dripin í álopum, sum hávar hava framt í Meksiko. Ein røð av háváálopum hava verið framvið meksikansku kyrrahavnstrondini, og fólk eru ræðslusligin. At hávur leypur á fólk, er nakað, sum ikki hendir ofta. Og tó. Seinastu tveir mánaðirnar eru trý fólk, sum hava surfað útfyri meksikansku strondini, álopin av hávum, harav tey tvey eru dripin.



## Stórur fundur í Grønlandi

Herfyri hittust teir fýra uttanríkisráðharrararnir úr Noregi, Ruslandi, Danmark og Kanada saman við vara uttanríkisráðharranum í USA til ein sonevnda polarhavs-fund í Illuisat í Grønlandi. Á fundinum umrøddu ráðharrarnir spurningar um eitt nú mark millum havøkir hjá londum, tilfeingið í havinum og nýggjar sjóvegis farleiðir.

# kappast á sama marknaði



*Eingin landing hevur verið á Havsbrún í Fuglafirði, síðan svartkjaftaskipini góvust at fiska fyri umleið 14 døgum síðan. – Tað er torført at siga, nær gongd kemur á framleiðsluna aftur, sigur Roy Róin*

sum skipini nú fiska, er býtt yvir hvørt skipið sær.

Ymiskt, hvussu stór sildakvotan hjá ymisku skipunum er, tað eru eisini tey, sum eiga meira enn ta einu kvotuna.

Tvey av skipunum, sum enn ikki eru farin á sild, men heldur hava valt at bíða, til sildin er vorðin feitari, eru Høgaberg og Fagraberg hjá Framherja. Hesi skip liggja framvegis á Fuglafirði, og reiðarin væntar ikki, at skipini fara at loysa fyribils.

Hini skipini eru flestu á sildaleiðunum norðarliga í íslendskum sjógvi.

### Nøgd og prísur

Roy Róin vísir á, at tað ikki er óhugsandi, at Havsbrún fer at fáa nakað av sild til ídnað, tá líður út á summarið og heystið.

- Høgu oljuprísirnir kunnu gera, at tað fer at loysa seg líka væl – og kanska betur - hjá skipunum at sigla til lands við størri nøgdum av sild til ídnað enn at sigla við smærri nøgdum til matna á marknaðin, sum liggur longur burturi. Haraftrat kemur, at útlit eisini eru til hægri ídnaðarprís, tá innihaldið av lýsi í sildini sum frá líður verður størri.

Í fjør keypti Havsbrún bert smáar nøgdir av sild til ídnað, og hetta hekk eisini saman við, at Noreg aftur gav føroyskum skipum loyvi at landa sild til matna í Noreg, eftir at stríð hevði verið um býtið av norðhavssildini.

- Tað er ógvuliga torført at meta um, hvussu verður seinni í summar og til heystar, tí hetta veldst sjálvsagt eisini um, hvør prísurin á sildini til matna – og til ídnað - verður. Alt er ein spurningur um útboð og eftirspurning. Verður útboðið stórt, samstundis sum sildin gerst bleytari, tá hon fitnar, er hugsandi, at prísirnir fyri matsild fara at fella, samstundis sum prísirnir til ídnað kanska fara at kvinka uppeftir.

### Fiskur og landbúnaður

Roy vísir á, at tað ikki er óhugsandi, at høgu lýsiprísirnir og høgu oljuprísirnir fara at føra nøkur skip til Fuglafjarðar, sum summarið líður.

- Rapsolja, sum bæði verður brúkt í matframleiðslu, lýsitablettum og til drívmegi av motorum, er mangulvøra á marknaðinum, og tí er lýsiprísurin høgur og uppeftirgangandi. Hinvegin er mjølprísurin lágur, og ein orsøkin er, at eitt nú soya og mais verða blandað upp í fóðurið til alivinnuna, sum aftur minkar um eftirspurningin eftir fóðuri úr fiski. Blandingin hevur til endamáls at gera fóðurið bíligari, sigur Roy Róin.

Vit kunnu soleiðis staðfesta, at tilfeingið úr havinum og grøðin úr jørðini á ein hátt kappast á somu marknaðum.

# Seinking úr Billund

**Flogfarið, sum skuldi fara úr Billund heim til Føroya seinnapartin í gjár, var seinkað í fleiri tímar, tí ein eftirlitslampa var farin at lýsa, tá ferðafólkini vóru komin í flogfarið**

FLÚGVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein eftirlitslampa fór at lýsa í flogfarinum hjá Atlantsflogi, tá flogfarið skuldi fara úr Billund heim til Føroya í gjár klokkan 14.50.

Eitt av ferðafólkunum sigur, at tey høvdu sitið eina løtu í flogfarinum, tá flogskiparin segði, at ein eftirlitslampa, sum ikki skuldi lýsa, kortini var farin at lýsa.

- Flogskiparin segði, at tey í samráð við teknisku leiðsluna í Føroyum høvdu gjørt av at restarta skipanina av nýggjum, men eftir hesa royndina lýsti lampan framvegis.

Tá ferðafólkini høvdu sitið í flogfarinum í einar 45 minuttir, fingu tey at vita, at mekanikari skuldi koma úr Keypmannahavn, og at tað helst fór at taka einar 2-3 tímar, áðrenn flogfarið kundi fara heim til Føroya.

- Vit hava júst fingið at vita, at vit fáa okkurt at eta. Her er gott veður, og vit hava tað øll gott, segði ferðafólkið, sum vit tosaðu við um 16-tíðina í gjár.

Eftir at teknikari var komin úr Keypmannahavn og hevði funnið út av, hvat var áfatt, kundi flogfarið hjá Atlantsflogi fara úr Billund.

Ferðafólkini vóru í Vágum í øllum góðum um 20.30-tíðina í gjárkvøldið.

- Vit høvdu tað øll gott, og Atlantsflog syrgdi fyri, at vit fingu tað, vit høvdu brúk fyri, meðan vit bíðaðu í Billund, sigur eitt av ferðafólkunum.



*Ferðafólk úr Billund lendu í Vágum um 20-30-tíðina í gjárkvøldið*